# Betri tenn á rennidegnum

Í flestu skúlunum í Tórshavnar kommunu verður rennidagur fríggjadagin 6. oktobur.

Til at seta fokus á tenn og sunnar mat- og drekkivanar, hevur Barnatannarøktin í Tórshavnar Kommunu boðið seg til, at koma út á skúlarnar við frískari frukt, vatndunkum gjørdir til dagin og upplýsandi tilfari um tenn.

Øll starvsfólkini í Barnatannrøktini eru við í tiltakinum og tí er Barnatannarøktin stongd henda dagin.

# Børnini dansa í Norðurlandahúsinum

23. veturin á rað veðrur skipað fyri barnadagnsi í Norðurlandahúsinum. Fyrsta kvøldið verður í morgin – fríggjakvøldið – og er endamálið at læra nýggja ættarliðið kvæðaskap okkara, og við hesum kveikja áhugan fyri varðveitslu av kvæðunum sum ein livandi part av mentan okkara.

Tað eru Norðurlandahúsið og Dansifelagið í Havn, sum hava skipað fyri barnadansinum øll árini.

# Sunleif hevur framførslur í Berlin

Leygarkvøldið klokkan 19:30 verður stórfingin frumframførsla av kórverki hjá Sunleif Rasmussen. Hetta er verk fyri dupultkór og tvær violinir. Frumframførsan verður í Berliner Konzertsahl, við kamarkórinum hjá NordDeutsche Rundfunk í Berlin og svensku violinduoini Duo Gielland. Berliner Konzertsahl er ein av bestu konserthøllunum í Evropa.

Verkið er bílagt av norðurtýska kringvarpinum. Kórið, ið kallast "Rias Kammerchor", er eitt av bestu kórunum í Evropa. Tað var kendi týski orkestur og kórleiðarin Furtwangler, ið stovnaði kórið.

Verkið kallast "Creatio Caelli et Terrae: Dies Quartus". "Skapanin av himmalinum og jørðini: fjórði dagur". Fjórði skapanardagur er skapanin av sólini, mánanum og stjørnunum.

Sunleif Rasmussen hevur eina ferð áður fingið framført verk í Berlíner Konzerthaus. Hetta var á Norðurlendsku Tónlistadøgunum í Berlin í 2002.




Samskip í Føroyum bjóðar viðskiftafólki sínum flutnings- og goymsluloysnir við tilhoyrandi tænastum, bæði í Føroyum og úti í heimi. Samskip er partur av Samskip HF. Hjá Samskipum starvast 1.400 fólk á 59 skrivstovum í 23 londum. Samskip hevur tvey skip skrásett í FAS. Tvær linjur sigla uppá Føroyar. Til og úr Føroyum verður siglt til Immingham, Rotterdam, Cuxhaven, Varberg, Aarhus, Reykjavík og Reyðarfjørðin.

**NÝGGJ TELEFONNUMMUR**

Vit hava broytt telefonnummarið hjá Samskip frystigoymsluni í Kollafirði. Telefonnummur okkara eru nú hesi:

| | |
|---|---|
| Høvuðsnummar | 30 88 00 |
| Innflutningsdeildin | 30 88 20 |
| Útflutningsdeildin | 30 88 30 |
| Frystigoymslan | 30 88 40 |
| Bingjuterminalurin og koyring í Føroyum | 30 88 50 |

SAMSKIP

Yviri við Strond 23 · 100 Tórshavn · Tel 30 88 00 · Fax 30 88 01 · www.samskip.com



Samskip í Føroyum bjóðar viðskiftafólki sínum flutnings- og goymsluloysnir við tilhoyrandi tænastum, bæði í Føroyum og úti í heimi. Samskip er partur av Samskip HF. Hjá Samskipum starvast 1.400 fólk á 59 skrivstovum í 23 londum. Samskip hevur tvey skip skrásett í FAS. Tvær linjur sigla uppá Føroyar. Til og úr Føroyum verður siglt til Immingham, Rotterdam, Cuxhaven, Varberg, Aarhus, Reykjavík og Reyðarfjørðin.




**STARV INNAN SHIPPING OG SKRIVSTOVU**

Fyri eitt av starvsfólkum okkara í barnsburðarfarloyvi, søkir Samskip eftir dugnaligum og ágrýtnum fólki til skrivstovu okkara í Havn. Starvið er tíðaravmarkað frá 1. desember 2006 til 31. desember 2007. Fyri rætta viðkomandi kann tó verða talan um fast starv eftir hetta.

**Vit bjóða** eitt starv í shipping og skrivstovuarbeiði í út- og innflutningi, kundaavgreiðslu og øðrum innanhýsis og uttanhýsis uppgávum. Í arbeiðinum samskiftir tú við starvsfólk og viðskiftafólk í Føroyum og við systirfyritøkur úti í heimi. Tú kemur at starvast í einum lokalum og altjóða kappingarumhvørvi saman við einum ungum og dynamiskum toymi.

**Vit vænta** at tú hevur viðkomandi útbúgving og royndir. At umsøkjarin er nærlægdur, miðvísur og dugir at arbeiða í einum umhvørvi, har úrslit, tænasta og deadline eru lyklaorð. Vit vænta at tú dugir væl at samskifta á enskum.

**Løn** sambært avtalu, treyta av útbúgving og royndum.

**Meira fæst at vita** um starvið við at venda sær til Joel undir Leitinum, stjóra á telefon 308811.

**Umsókn við CV** skal sendast til: Samskip, Box 3255, FO-110 Tórshavn. Brævbjálvin skal merkjast "umsókn". Umsóknarfreistin er 23. oktober.

SAMSKIP

Yviri við Strond 23 · 100 Tórshavn · Tel 30 88 00 · Fax 30 88 01 · www.samskip.com



ÚTBJÓÐING

**Sanatoriivegurin í Hoydølum**

**Við hesum verður arbeiðið viðv. vegagerð í Hoydølum, boðið út í almennari lisitatión.**

**Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um:**
Gerð av 5m breiðum vegi, partvís við tilhoyrandi P-plássi, gongubreyt, brunnum og kloakk, samlað longd umleið 150m.

Gerð av rundkoyring, D= 20m.
Íbindingar og umvæling av verandi P-plássum o. a.

**Høvuðsnøgdirnar eru hesar:**

| | |
|---|---|
| Uppfylling, komprimering og planering | 5.500m³ |
| Fibertexdúk og jørðarmering | 8.000m² |
| Kantsteinar | 750lbm |

Arbeiðið skal vera liðugt í seinasta lagið 2. mai 2007.

Lisitatiónin verður hjá Landsverki, Tinghúsvegi 5, FO-100 Tórshavn

hósdagin 26. oktober 2006, kl. 10.00.

Ástaðarfundur verður mánagin 23. oktober 2006, kl. 10.00.

Møtt verður við reinsiverkið í Hoydølum.

Útbjoðingartilfarið kann bíleggjast frá týsdegi 10. oktober 2006, við at venda sær til:

Landsverk
Tinghúsvegur 5
Postsmoga 78
FO-110 Tórshavn
Telefon: 340 800

Útbjoðingartilfarið verður útflýggjað móti einum veghaldi til støddar kr. 2.000, ið verður at flyta á konto nr. 134.228.4 í Føroya Sparikassa. Veðhaldið verður afturgoldið, um útbjóðingartilfarið er aftursent óskalað í seinasta lagi eina viku eftir listiatiónina, t.e. 2. november 2006.

**Landsverk** er ein stovnur undir Vinnumálaráðnum, og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallamál, herundir tyrlupallar.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land